Grannskoðarafelagið Sp/f
RASMUSSEN & WEIHE
Statsaut. Revisorar
Associate member of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf (+298) 31 10 17
Fax (+298) 31 10 18
Sp/f nr. 267
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

S160-7

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
100 Tórshavn

## Ársroknskapur 1998
(7. roknskaparár)

**Avrit**

344R_98.WPD

## Innihaldsyvirlit

Almennar upplýsingar .......... 2
Roknskaparátekning .......... 2
Ársfrágreiðing .......... 3
Grannskoðaraátekning .......... 5
Nýttur roknskaparháttur .......... 6
Rakstrarroknskapur .......... 7
Fíggjarstøða pr. 31. desember .......... 8
Gjaldførisfrágreiðing .......... 9
Notur til ársroknskapin .......... 10

# Almennar upplýsingar

**Stovnurin**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
c/o Toll- og Skattstova Føroya, stýrið
Traðargøta 39
FO-160 Argir

**Grannskoðan**

Grannskoðarafelagið
**Rasmussen & Weihe, spf.**

**Stýrið**

Sigurd Poulsen, formaður
Jógvan Vágsheyg, næstformaður
Gunnvør Dam Jensen
Jenny Lydersen

# Roknskaparátekning

Ársroknskapurin verður saman við ársfrágreiðingini við hesum góðkendur.

Tórshavn, hin 26. februar 1999

Stýrið:

Sigurd Poulsen, formaður

Jógvan Vágsheyg, næstformaður

Gunnvør Dam Jensen

Jenny Lydersen

Roknskapurin er góðkendur á stýrisfundi tann 26. februar 1999

Fundarstjóri

# Ársfrágreiðing

## Virksemi

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mei 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn.

Fæ grunsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum ½ prosent av teirra árligu skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar árliga rinda ½ prosent av útgoldnu A-inntøkunum.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 ár tann 1. apríl 1997.

## Inntøkuviðurskifti

Á hvørjum ári skal ein endalig uppgerð gerast, fyri at kanna eftir, um grunnurin hevur fingið tað inngjald hesin eigur sambært lógina ella um nakað skal endurrindast til tey, sum hava goldið inn. Eingin slík uppgerð er gjørd fyri árið 1998, men ætlanin er at gera hesa uppgerð seinni í 1999.

Stýrið fyri grunnin hevði tí tað val, antin at bíða eftir hesi uppgerð, ella enda ársroknskapin hesi óvissu um inngjøldini.

Stýrið metir, at henda óvissa ikki er av eini tílíkari støðd, at henda hevur týðandi ávirkan á roknskapin, og tí er ársroknskapur uppsettur, uttan at henda endaliga uppgerð er gjørd.

Ein møgulig broyting verður tískil tikin við í komandi roknskaparári.

## Fíggjarlig lýsing

Í mun til undanfarna ár er inngjaldið frá løntakarum og arbeiðsgevarum hækkað við tkr. 2.384 - frá tkr. 38.766 í 1997 til tkr. 41.150 í 1998.

Útgjaldingin av arbeiðsmarknaðareftirlønum var tkr. 34.286 fyri alt árið 1998 í mun til tkr. 24.019 fyri 9 mánaðir í 1997.

Avsetingar og tap uppá skuldarar minkaði frá tkr. 1.193 í 1997 til tkr. 348 í 1998.

Úrslitið áðrenn fíggjarligar postar og óvanligar inntøkur gjørdist í 1998 ein vinningur uppá tkr. 5.861 ímóti einum vinningi uppá tkr. 12.787 í 1997.

Fíggjarligu inntøkurnar í 1998 vóru tkr. 9.623 ímóti tkr. 8.107 og stavar hesin vøkstur millum annað frá økingini í umferðarfænum.

Stovnurin hevði í árinum eina óvanliga inntøku og útreiðslu uppá ávikavist tkr. 1.157 og 194.

Grunnurin hevur í árinum gjørt íløgur í donsk lánsbrøv við einum áljóðandi virði upp á tkr. 30.000. Samanlagt er áljóðandi upphæddin í lánsbrøvum nú tkr. 80.625 harav tkr. 50.625 eru í føroyskum lánsbrøvum.

## Úrslit

Ársúrslitið í 1998 gjørdist eitt rakstraravlop uppá tkr. 16.448 ímóti einum avlopi uppá tkr. 23.878 í 1997.

Eftir hetta verður eginogn grunsins pr. 31. desember 1998 tkr. 209.845.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Einki er hent eftir roknskaparlok, ið hevur serligan týdning fyri metingina av ársroknskapinum.

## Framtíðin

Mánaðarliga upphæddin, sum var útgoldin sum arbeiðsmarknaðareftirløn, var í 1998 kr. 525. Gjaldið fyri 1999 er sett til kr. 560 pr. mánaða.

Stýrið metir, at við núverðandi inngjaldingarhátti, kann roknast við at útgjaldingin í ár 2005 verður uppá kr. 774 pr. mánaða.

## Ár 2000

Í samband við skiftið til ár 2000, hevur grunnurin havt í huga, um trupulleikar kunnu standast av hesum.

Grunnurin hevur ikki egna edv-skipan, men fer alt edv-samskifti fram á Toll- og Skattstovu Føroya, sum umsitur virksemi hjá grunninum.

Toll- og Skattstovan vil ikki geva grunninum nakra váttan upp á, at trupulleikar ikki standast av ár 2000-skiftinum, men upplýsir at tað er Elektron, sum hevur ábyrgdina av edv-skráunum hjá stovninum og at henda fyritøka arbeiðir av øllum alvi at loysa henda trupulleikan. Upplýst verður, at allar edv-skráir eru kannaðar og broyttar har tað er neyðugt, og at tað nú bert er eftir at testa hesa broytingar.

Toll- og Skattstovan upplýsir eisini, at um stovnurin verður vitandi um trupulleikar, sum íkoma orsakað av ártúsundskiftinum, vil stovnurin boða Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum frá hesum beinan vegin.

## Ognarviðurskifti

Grunnurin er ein sjálvseigandi stovnur.

Sambært lógini fyri grunnin verður valt eitt stýri at sita fyri grunninum. Hetta stýrið, sum skal hava fýra limir og sum verður valt fyri eitt trý ára skeið, verður valt soleiðis: Ein limur umboðandi arbeiðsgevarar, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi Tryggingarsambandið Føroyar og stjórin í Landsbanka Føroya.

Landsstýrið tilnevnir formannin í stýrinum.

## Grannskoðaraátekning

Vit hava grannskoðað ársroknskapin, greiddur av leiðsluni, fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fyri árið 1998.

**Um grannskoðanina**
Í samsvar við alment viðurkendar grannskoðarareglur er grannskoðanin skipað og framd við tí endamáli at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi feilir ella vanta týðandi upplýsingar í roknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í roknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eins og vit hava mett, um upplýsingarnir í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við roknskaparkrøv í lóggávuni, og at hann gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Tórshavn, hin 26. februar 1999

Grannskoðarafelagið
**Rasmussen & Weihe, spf.**

Klaus Rasmussen
statsaut. revisor

Joen Magnus Lamhauge
reg. revisor

# Nýttur roknskaparháttur

## Alment

Roknskapurin er greiddur í samsvari við góðan roknskaparsið.

Grunnurin er ikki bundin av at gera roknskap í tráð við ársroknskaparlógina, men roknskapurin er gjørdur sambært meginreglunum í ársroknskaparlógini.

Nýtti roknskaparhátturin er í høvuðsheitum fylgjandi:

## Inntøkur

Inntøka grunsins - arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið - er fyri løntakarar gjørt upp sum ½ prosent av skattskyldugu inntøkuni fyri 1998 sambært fyribilsskattaskrásetingini.

Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum ½ prosent av útgoldnu A-inntøkuni fyri 1998.

Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til inntøkuviðurskiftini í ársfrágreiðingini hjá stýrinum.

## Áogn

Skuldarar eru virðisásettir við frádrátti av møguligum tapsvanda, grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

## Lánsbrøv

Lánsbrøv eru upptikin til kurs ultimo í árinum.

## Tíðaravmarkingar, áogn

Upphæddin umfatar útgoldnar útreiðslur í árinum, sum eru viðvíkjandi eftirfylgjandi ári.

## Skattur

Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

# Rakstrarroknskapur

| | Nota | 1998 | *1997* |
|---|---|---|---|
| | | | *(kr. 1.000)* |
| Nettoinntøka | 1 | 41.150.479 | *38.766* |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | | -34.285.750 | *-24.019* |
| Aðrar útreiðslur | | -654.917 | *-767* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar | 2 | -347.859 | *-1.193* |
| | | **5.861.953** | ***12.787*** |
| Staðfestur kursvinningur | | 0 | *278* |
| Ikki staðfestur kursvinningur | | 533.313 | *304* |
| Rentuinntøkur | 3 | 9.089.661 | *7.810* |
| Rentuútreiðslur | | 0 | *-285* |
| | | **15.484.927** | ***20.894*** |
| Óvanligar inntøkur | 4 | 1.156.686 | *2.984* |
| Óvanligar útreiðslur | 5 | -193.644 | *0* |
| **Ársúrslit** | | 16.447.969 | *23.878* |

1344R_98.WPD

# Fíggjarstøða pr. 31. desember

## Aktiv

| | Nota | 1998 | 1997 |
|---|---|---|---|
| | | | *(kr. 1.000)* |
| Áogn | 6 | 22.353.585 | *20.831* |
| Lán til Arbeiðsloysistryggingina | | 18.946.774 | *26.364* |
| Lánsbrøv | | 81.254.281 | *50.494* |
| Tøkur peningur | | 85.981.911 | *94.598* |
| Umferðarfæ í alt | | **208.536.551** | *192.287* |
| Tíðaravmarking | | **3.063.410** | *2.900* |
| **Aktiv íalt** | | **211.599.961** | *195.187* |

## Passiv

| | Nota | 1998 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Eginogn | 7 | **209.845.322** | *193.397* |
| Ov nógv innkravd arbeiðsmarknaðargjøld | | 1.664.728 | *1.563* |
| Onnur skuld | | 89.911 | *227* |
| Skuld í alt | | **1.754.639** | *1.790* |
| **Passiv íalt** | | **211.599.961** | *195.187* |
| Møguligar aðrar skyldur | 8 | | |

1344R_98.WPD

# Gjaldsførisfrágreiðing fyri 1998

| | |
|---|---|
| Ársúrslit 1998 | 16.447.969 |
| **Broytingar í ogn og skuld grunsins:** | |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald fyri 1997 og áður (arb.gev.) | 907.628 |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald fyri 1998 (arb.gev.) | -1.171.581 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, løntakarar | -1.258.813 |
| Lán Arbeiðsloysistryggingin | 7.417.460 |
| Tíðaravmarkingar | -163.260 |
| Ov nógv innkravt arbeiðsmarknaðargjald | 102.127 |
| Onnur skuld | -137.047 |
| Gjaldførisúrslit fyri 1998 | 22.144.483 |
| Gjaldførið pr. 1. januar 1998 | 145.091.709 |
| Gjaldførið pr. 31. desember 1998 | **167.236.192** |

**Sundurgreining av gjaldføri:**

| | |
|---|---|
| Lánsbrøv | 81.254.281 |
| Tøkur peningur | 85.981.911 |
| | **167.236.192** |

# Notur til ársrokskapin

## 1. Nettoinntøka

| | 1998 | 1997 (kr. 1.000) |
|---|---|---|
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | 21.169.283 | *19.966* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 19.981.196 | *18.800* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald í alt | **41.150.479** | ***38.766*** |

Nettoinntøkan - arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið - er fyri løntakarar gjørt upp sum ½ prosent av skattskyldugu inntøkuni fyri 1998 sambært fyribilsskattaskrásetingini. Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum ½ prosent av útgoldnu A-inntøkuni fyri 1998.

## 2. Avsetingar og tap uppá skuldarar

| | | |
|---|---|---|
| Vøkstur í avseting móti tapi uppá skuldarar, arbeiðsgevarar | -50.000 | *1.150* |
| Minking í avseting móti tapi uppá skuldarar, løntakarar | 3.734.025 | *0* |
| Avskrivað krav um arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | -3.734.025 | *0* |
| Avskrivað krav um arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgev. | -250.709 | *-1.980* |
| Avskrivað renta, arbeiðsgevarar | -47.150 | *-363* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar í 1998 í alt | **-347.859** | ***-1.193*** |

## 3. Rentuinntøka

| | | |
|---|---|---|
| Renta av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi, arbeiðsgevarar | 115.294 | *233* |
| Renta av virðisbrøvum | 2.704.305 | *112* |
| Renta av láni til Arbeiðsloysistryggingina. | 1.409.225 | *3.794* |
| Renta av innistandandi í peningastovnum | 4.860.837 | *3.671* |
| Rentuinntøkur í alt | **9.089.661** | ***7.810*** |

## 4. Óvanligar inntøkur

| | | |
|---|---|---|
| Inntøkuføring av ov nógv avsettum krøvum fyri 1992-1996 | 0 | *2.984* |
| Ikki uppkravd gjøld frá løntakarum undanfarin ár | 1.156.686 | *0* |
| Óvanligar inntøkur íalt | **1.156.686** | ***2.984*** |

## Notur til ársrokskapin

| | 1998 | 1997 |
|---|---|---|
| | | *(kr. 1.000)* |

### 5. Óvanligar útreiðslur

| | | |
|---|---|---|
| Rætting av gjøldum frá arbeiðsgevarum undanfarin ár .... | -193.644 | *0* |
| Óvanligar útreiðslur íalt ......................... | **-193.644** | ***0*** |

### 6. Áogn

| | | |
|---|---|---|
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald fyri 1997 og áður (arb.gev.) | 32.512 | *940* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald fyri 1998 (arb.gev.) ..... | 19.981.196 | *18.810* |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, løntakarar og Føroya Gjaldsstova . | 2.339.877 | *1.081* |
| Áogn íalt ..................................... | **22.353.585** | ***20.831*** |

### 7. Eginogn

| | | |
|---|---|---|
| Eginogn primo ................................ | 193.397.353 | *169.519* |
| Flutt úrslit .................................. | 16.447.969 | *23.878* |
| Eginogn ultimo ............................... | **209.845.322** | ***193.397*** |

### 8. Møguligar aðrar skyldur

Tað áhvíla ikki grunninum aðrar møguligar skyldur, herundir borgs- og ábyrgdarskyldur, enn tær, sum eru nevndar í roknskapinum.